# Ítróttarfelag Fuglafjarðar



## ÍF - KÍ

**LANDSKAPPING**

Leygardagin 19. mai 2001

Kl. 15.00 í Fuglafirði

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 64
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fartel. 22 42 53
Fax 445 053

# ÍF - KÍ

4. umfar í landskappingini hjá
2. deild monnum
19. mai 2001

## Leikskrá 2

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Álvur Haraldsen, Sosialurin*
*Rógvi Róin*

**Kápumynd:**
*Roy sparkar bóltin burtur áðrenn Ingi Rasmussen frá HB fær taklað. Myndin er frá dystinum í Havn 28.04, sum ÍF tapti 3-2.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*



# ? NÚ BRAGDAÐI

Eftir eina heldur laka byrjan, vístu okkara menn seinasta vikuskifti á Krossinum í Sumba, at teir kunnu meir, enn teir hava víst teir báðar fyrstu dystirnar í landskappingini. Sumbingar fingu av at vita, og okkara lið vann heili 0-4. Serliga í 1. hálvleiki gekk væl, og vit avgjørdu eisini dystin í hesum hálvleikinum. Nýggi álopsmaðurin hjá okkum, runavíkingurin Jan Jørgensen, skeyt tvey av málunum, meðan Eyðolvur skeyt eitt og eitt var sjálvmál.

Kanska eitt sindur spell, at okkara menn ikki fingu spælið at hanga saman teir báðar dystirnar áðrenn, tí nú hava teir longu mist 5 stig av 9 møguligum. Men tað gert ikki við. Vit koma aftur, og gongdin í 2. deild er ikki heilt tann sama sum í 1. deild. –Tað vísir seg sum oftast, at eitt tap ella tvey ávirka ikki eitt pláss í toppinum á sama hátt, sum tað ger í 1. deild. Tíbetur fyri okkum! Tí er eingin orsøk at halda, at teir báðir fyrstu dystirnir ímóti HB og LÍF, hava avgjørt, at vit ikki røkka okkara mál: at flyta upp í 1. Deild.

At hyggja eftir tí farna, fáa vit heldur ikki nýtt til so øgiliga nógv. Vit hava lært - tað kunnu vit nýta tað til! Men at setast og fella í fátt, tað dugir ikki. –Og tað gera okk-ara leikarar heldur ikki. Tað vístu teir í dystinum í Sumba seinasta vikuskiftið. -Menn vóru uppsettir, og leiktu sum *eitt* lið. -Í 1. hálvleiki í viðrákið, meðan í seinna hálvleiki kann sigast, at rákið var ímóti. Sumba trýsti stóran part av hálvleikinum, men okkara verjupartur og serliga Alfred í málinum stóðu seg væl.

Dysturin í dag er tí ógvuliga týdningarmikil. KÍ hevur eitt stig fleiri enn vit, nevnliga 5. Og teir eru ikki at kimsa at, sjálvt um talan er um næstbesta liðið hjá klaksvíkingum. Teir hava nógvar ungar og evnaríkar leikarar. Leikarar, sum hava framtíðina fyri sær, og sum um ikki langa tíð, fara at vera á 1. liðnum hjá KÍ. Men hetta ræðir ikki okkum. Vit skulu hava respekt, men hinvegin eiga vit at kunnu vísa, hvar skápið skal standa. Men treytin er sjálvsagt, at serliga teir eldru og mest royndu leikararnir á okkara liðið, mugu vísa veg, og "fighta" allan dystin. Gera teir tað, so fylgja ungu og minni royndu leikararnir eisini við. Enn eru hesir ov óroyndir, at skulu verða drívmegin!

Drívið á dreingir!!

Góðan dyst!





# VIT MUGU VINNA Í DAG

### Fáa vit stríðsandan fram, sum vístur varð í Sumba seinasta vikuskifti, so vinna vit í dag.

Gestirnir í dag hava fingið eina heldur betur byrjan enn vit hava fingið á landskappingina. Teir hava spælt tveir javnleikir, og vunni ein dyst, og hava tískil 5 stig, meðan vit hava 4. Men sjálvt um støðan er hendan, so mugu vit sigast at verða stórfavorittar til dystin í dag. Og hetta er ikki altíð so heppið, tað eru fleiri lið, sum kunnu ásanna tað. Men í dag vóna vit, at neyðuga hepnið verður við okkum, soleiðis at vit framvegis vera millum fremstu liðini í deildini.

KÍ-liðið, sum í dag vitjar okkum, er nakað skert í mun til fyrstu dystirnar. 1. liðið hjá klaksvíkingum manglar onkrar leikarar, orsakað av skaðum o.ø., samstundis sum fleiri av føstu 2. liðsleikarunum eru skaddir. Andrias Josephsen, sum er venjari hjá KÍ-liðnum, sigur, at teir helst mangla eini 3-4 av føstu leikarunum í dag. "Tí kann sigast, at vit eru ógvuliga nógv tengdir av 1. deild", sigur Andrias. Men hetta verður kortini neyvan nakað, sum hevur við sær, at KÍ møtir upp við einum "krykku-liðið". Vit vita, at teir hava eina rúgvu av ungum og evnaríkum leikarum, sum kunnu koma í mans stað.

Andrias er ógvuliga væl nøgdur við fyrstu 3 dystirnar hjá liðnum. "Enn hava vit ikki tapt nakran dyst, og spælið hevur til tíðir verið gott. Serliga í dystinum ímóti GÍ seinasta vikuskiftið (4-0 til KÍ, red.) vístu vit ógvuliga gott spæl. Dystin í Havn ímóti B36 áttu vit at vunni. -Vit høvdu nógvar málmøguleikar, men fingu kortini bert tað eina málið", sigur Andrias.

Klaksvíkingar eiga eina rúgvu av góðum ungum leikarum, og tað eru serliga hesar 2. lið er samsett av. Andrias sigur, "at tað sum kanska ger munin, er, at teir hava nakrar eldri og royndar leikarar afturat teimum ungu, nevnast kunnu m.a. Olgar Danielsen, Finn Baldvinsson og Pól Juul Vilhelmsen". Andrias hevur tað áskoðan, at um tú vísir ungu leikarunum álit, so vísa teir álit aftur. "Eisini motivatiónin er serstakliga týdningarmikil, og kann bera ávøkstur serliga í einum dyst sum í dag. "Eitt stig á útivølli er nøktandi, men vit fara ongantíð inn fyri at spæla verjufótbólt. Mín filosofi er nevnliga tann, at vit ikki leggja okkum aftur at verja frá byrjan. Og tað

"Eg havi mín takktikk, men hann verður ikki avdúkaður her"

er heldur eingin skandala um vit tapa í dag", sigur Andrias. Spurdur um hann hevur nakran ávísan takktikk til dystin í dag sigur Andrias, at „eg havi mín takktikk, men hann verður ikki avdúkaður her".



# EITT "V" KANN GERA STÓRAN MUN

At eitt "v" kann gera so stóran mun, sum tað gjørdi í seinastu leikskránni, er ótrúligt. Men tað kann. -Vit skrivaðu nevnliga, at Pauli hevði verið "ein av stuðulsleikarunum á vesta liðnum hjá grannunum..." Tað skuldi sjálvsagt standa "besta". Ja, so stóran mun kann eitt "v" gera. Pauli, vit umbera!

Eisini í greinini um greipuvinnararnar í flogbólti var ein villa komin í. Myndirnar, sum vóru prentaðar í leikskránni, vóru ikki tiknar á flogbóltskapping í Klaksvík, men undir og eftir dystinum, sum tryggjaði meistaradeildini hjá monnum Føroyameistaraheitið. Hetta mistakið umbera vit eisini.

UNGIR ÍF'ARAR

# 14 JOHN S. THOMSEN

**John er ein av nýggju og óroyndu leikarunum á okkara 1. liðið. Men samstundis er hann ein av evnaríku leikarum okkara, sum kann, um hugurin er til staðar, gera seg galdandi**

John hjá Jákupi hjá John er ein av ungu leikarunum á ÍF-liðnum í dag. Evnini hevur hann góð, men til tíðir er hugurin kanska ikki eins góður sum evnini. Tað man vera ein av orsøkunum til, at John ikki hevur bitið seg meir fastan á 1. liðið hjá ÍF, enn hann hevur.

Í fjør gekk einki serligt hjá John. Hann var skaddur stóran part av fyrru hálvu, og tað hevði við sær, at hann slettis ikki slapp at royna seg á besta liðnum. Í seinnu hálvu gekk betur, og tá leikti hann flestu dystirnar - antin frá byrjan, ella eisini koma hann inn. Tó hevði hann snúsa til 1. liðið áður. Hetta var meðan Piotr var venjari, men tá var bert talan um venjingardystir.

Hvaðani evnini hjá John (og Mortani fyri tann skuld) stav-a frá, er ilt at siga. Haldi ikki at mamman, Marin, hevur leikt tað stóra av bólti. Tí man Jákup, pápin, helst hav-a fingið somikið burturúr leygarkvøldstímanum í høllini, at hann hevur givið dreingjunum eitt sindur í beinini eisini. Í øllum førum eru evnini hjá John góð, og tað er úttøkan og luttøkan hjá honum á U-18 landsliðnum besta prógvi um. Hann var nevnliga við í undankapping í Finnlandi fyri U-18 landslið. Av teimum




trimum dystunum, sum leiktir vóru á ferðini, leikti John við í dystinum ímóti Finnlandi. Á ferðini í Finnlandi vóru fleiri leikarar, sum í dag leika í 1. deild. Nevnast kunnu m.a. Klæmint Matras, Hjalgrím Eltør og ikki minst Atli Gregersen, sum í vikuni gjørdi sáttmála við Randers Freja og Súni Olsen, sum er sáttmálaleikari í FC Zwolle í Hálandi.

Málið hjá John í ár er, at flyta upp, og tað er væl skilligt. Møguleikin er góður, og um so verður, kann John eisini skriva 1. deildarleikari á sítt visitkort.

Sjálvur sigur John seg ikki hava serliga ambitiónir við fótbóltinum. "Eg taki tað sum eitt frítíðarítriv, sum alt annað". So má tíðin vísa, hvat eg havi tíð til". "Men um hugurin verður har, ætli eg at royna at koma á okkurt landslið". Fyribils má tað so gerast A-landsliðið, tí vit hava einki U-21 landslið, sum er.

Í løtuni er John í gongd við lestur á HF- og studentaskúlanum á Kambsdali. Hann hevur eitt ár eftir av sínum HF-lestri, so hann verður helst í Fuglafirði í øllum førum eitt ár afturat. "Men so havi eg ongar ætlanir", leggur John afturat.

"Um hugurin verður har, ætli eg at royna at koma á okkurt landsliðið"

Vit kunnu bert vóna, at hugurin hjá John at leika fótbólt verður til staðar, eisini í framtíðini. Verður hann tað, so hava vit uttan iva ein evnaríkan og týðandi leikara í hópinum. Lat okkum so eisini vóna, at John velur at leika við ÍF - um hugurin verður har.





## TÚ

**Navn:** John S. Thomsen
**Føðingardagur:** 26.12.1981
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Skúlanæmingur, gangið á HF
**Pláss á vøllinum:** Allastaðni uttan í málinum
**Hædd og vekt:** 174 cm. og 65 kg.
**Yvirtrúgv:** Ikki eta fugl áðrenn dyst
**Motto:** Porno
**Torførast mótstøðumaður:** Tórstein (bara fyri at hann skal halda, at onkur heldur hann vera góðan)
**Frítíðarítriv:** Badminton
**Vónir fyri 2001:** At flyta upp

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. Liðið:** Einaferð í fjør. Minnist ikki nær!!
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tá eg var heilt lítil - 3 ella 4 ár
**Aðrar ítróttargreinar:** Badminton
**Minnigarríkasti dystur:** Tá ið vit vunnu Cadburysteypið
**Størstu fótbólstliga ávirkan:**
Tá ið eg spældi niðri við FC Midtjylland
**Besti fótbóltsleikari:** Tað eru so nógvir
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Tennis
**Hvat slag av venjing dámar tær best:**
Tekniska venjing
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:**
Fysiska venjing
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** ÍF-liðið

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** Flak og chips frá ommu
**Slag av tónleiki:** Alt
**Sjónvarpssending:** Eingin
**At slappa av:** Sitið í lenistólinum og hyggi eftir fótbólti
**Troyggja nr.:** Nr. 14
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Maradona
**Sjónvarp/filmstjørna:** Rocco Sifredi
**Besta bók/blað:** Eg lesi ikki tað stóra, so tað má verða bankbókin

**Limir í PM-samtakinum:**

Wholesale

fóm
Icecream

ATLANTIC
PARTNER A/S
Copenhagen
Sales Company

Transport

# *Á rætta stað til røttu tíð*

**.Group**



- Stórkøkar
- Handlilsvørur
- Grill & Pylsuvognar
- Cafeteria



- Bakaravørur
- Proviantur
- Útbreiðsla
- Flutningur



**P/F Poul Michelsen**
Hoyviksvegur 74, P.O.Box 200, FO-110 Tórshavn
Tel +298 31 46 50, Fax +298 31 81 63, e-mail: pm@pm.fo





*Føroya størsta úrval av*
pakkitilfari úr karton
bylgjupapp
og plast
*innan øll vinnuøkir*



**FARPACK**
Staravegur 5, P.O. Box 3099,
FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
telefon +298 35 30 00, fax +298 35 53 10
farpack@farpack.com, www.farpack.com

## Altíð nýbakað breyð

Sunnumorgnar fæst breyð á hesum støðum:

- Statoil í Leirvík
- Hjá Halluri í Gøtu
- Hjá Rannvá í Søldarfirði
- Statoil í Saltangará
- Kiosk Vár í Saltangará
- Statoil á Strondum

**BREYÐMOLIN**
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 388



Salong Yndi
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490



the MILLENNIUM magic

ANNA
530 Fuglafjørður
tel. 444 899

## Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

## Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

## Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

## Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**

**Havsbrún Ltd. • 530 Fuglafjørður**
**tel. 444 100 • fax 444 160**
**havsbrun@havsbrun.fo**
**www.havsbrun.fo**



SKF

Umboð í Føroyum

ES **P/f Esmar Simonsen**

Kambsdalur • Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29






**Alfa Seafood Sp/f**
Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • E-mail: alfa@post.olivant.fo



Stórt úrval av steypum og heiðursmerkjum til allan ítrótt




SP/F LEIVUR ELLINGSGAARD
OPTIK - URSMIÐJUR
Tel. 45 52 03 - FO-700 Klaksvík

# Eykalutir!
-til tann besta prísin



# Fa. Billutir
410 Kollafjørður
tel. +298 421605 fax +298 421666
e-mail: billutir@post.olivant.fo

Landsins **størsta** og **besta** úrval av ítróttarheiðursgávum

- Steyp
- Heiðursmerki
- Heiðursbrøv
- Toy við búmerki
- Streamers
- Klistrimerki
- Seruppgávur við gravering

Vit seta **títt** búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað

FA. EILIF ARGE
KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76

## Føroya Shell

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |






HYDRAULIK
RÁÐGEVING
VERKÆTLANIR
ÍSETANIR
UMVÆLINGAR
MASKINUMVÆLINGAR
SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING



## Sølu-og tænastuumboð fyri:

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og línuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (ídnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

## Á goymslu:

Hydr. slangur og fittings, hydr. rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúlu-leigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.

# KJ-HYDRAULIK
P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com

# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar kommuna**

tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo



**Stórt úrval av vøkrum klæðum til børn og ung upp til 16 ár**

**Stórt úrval av skóm til alt brúk og allar aldursbólkar**

**TOYSTOVAN**

FUGLAFJØRÐUR TEL. 44 46 37

**VØRDSLAN**

**WEARHOUSE**

**Altíð fyrst við tí síðsta**



ÁLVASKOT
FYSIOTERAPI
☎ 44 51 44

# Tannlæknastovan

hjá

*Steintór Larsen*

Torkilskrókur 8
530 Fuglafjørður
tel. 444 358




GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71







# Vit selja ikki tryggingar, men trygd

Hjá Trygd fært tú persónliga ráðgeving - eisini eftir at skaðin er hendir. Tryggingarnar hjá Trygd fevna um:

- Sethúsatrygging
- Familjutrygging
- Ferðatrygging
- Biltrygging og Trygd Bilhjálp
- Sjóvátrygging

Vilt tú hava meira at vita um okkara tryggingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Føroya Banka ella við Trygd.

TRYGD

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11

# Tann nýggi Nissan Almera






**Nýggi dieselmotorurin**

Diesel Turbo
2.2
110 HK
Prísur: **185.000,-**



**Eykaútgerð**

Fáast eisini við eykaútgerð, sum prýður um

P/F Meinhardt Arge

NISSAN

**Tilfar til umvælingar, abøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
**tel. 444 126**



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

Toy & Tógv · 530 Fuglafjørður · tel. 444 494



**BAADER®**

*Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu*

**P/F Petur Larsen**
Postmoga 64 - 530 Fuglafjørður
tel. 444 174 - fax 444 285 - fartel. 214 174

**HS DEKK**
✆ 22 20 18
T-postur:hs-dekk@post.olivant.fo



**Øll sløg av trappum verða gjørd. Tilboð verða givin.**

# JBS - TRÆ

530 Fuglafjørður
Tel. 444 784




E&B VIRKIÐ

Element- og Betongvøruvirkið við Gjógv

tel 423173/445173
fax 444773
e-bvirki@post.olivant.fo








O·N·LY VERO MODA
KATO Fuglafjørður

**Danny Transport**

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**

*Stuðlið føroyskari heimavinnu!*

*Keypið føroyskar dygdarlutir frá*

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

*sum heldur til í "Piddasahandli"*

*Tel. 444 427*
*Opið er hvønn dag*

# Leiga buss??



Vit hava ein buss til 16 persónar.
Harav serútgjørdur til 8 ferðandi í rullustóli.
Vit eru altíð til reiðar at samráða eina nøktandi loysn fyri báðar partar.

**Andreas Poulsen**
Syðrugøta tel. 22 52 20 ella 44 17 20



*Reiðari innan frakt- & sandbátar*
*Krana- og lastvognskoyring*
*Sandsøla*

**SANDGREVSTUR**

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921



# Annleggs- og Urtagarðsarbeiði



- Flísar og betongsteinar
- Steinseting (brolægning)
- Grasvallir
- Planting
- Felling og røkt av trøum og runnum
- Ráðgeving
- o.a. urtagarðs-arbeiði

**Búgvi Róin** · Fløtugerði 14
530 Fuglafjørður · tel. 21 04 25



# Lastvognskoyring




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**
530 Fuglafjørður
tel. 444 245 ella 217 245







# Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:
- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)
☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo



# ORKUSPARANDI STOYPIJARNSKETIL

**Logica ketilin er ein av teim førandi stoypijarnsketlinum á marknaðinum. Brúk verður tikið av ný tøkni innan orkusparing, ið tryggjar kundanum tann bíligasta raksturin.**




Ketilin er lættur at reinsa, og er ljóð isoleraður





Tekningin her vísir hvussu gongdin hjá roykinum er gjøgnum ketilin. Dentur verður lagur á at ongin hiti fer til spillis.

Leysar roykforingar eru við til at økja um bíligan rakstur



**VVS HORNIÐ spf**
Landavegur 2 . Tórshavn
Tel 318023 / Fax 310963
vvshorni@post.olivant.fo

# Úrvalsbilar Spf.

www.bilar.fo

Søla av brúktum innfluttum bilum.

Alt vanligt verkstaðs-arbeiði verður gjørt.




UB

Úrvalsbilar Spf.
Bakkavegur
FO-530 Fuglafjørður

Telefon: 444943
Telefax: 444638
Fartel.: 281943





kvik



# Nýggjan køk...?

**Køkssentrið** sp/f
Smærugøta 6, Postboks 3182, 100 Tórshavn
Tel 31 24 80, Fax 31 97 18




www.sparikassin.fo



Út at stima á alnótini...

Á heimasíðuni hjá Føroya Sparikassa, www.sparikassin.fo, finnur tú eitt góðadagaland.
Sethúsamarknaður, gjaldoyrayvirlit og lániútrokningar eru bara nakrir av teimum nýggju møguleikunum á www.sparikassin.fo.
Føroya Sparikassi hevur tikið enn eitt stig inn í framtíðina

FØROYA SPARIKASSI



# Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard)



Avtala um viðlíkahald av teldum/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.



Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....

Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.

HEWLETT® PACKARD
Expanding Possibilities

# J.J-teld

530 Fuglafjørður

Tel. 253 803



Siro GC Ti
Stødd: 5-12 + 13
799,-



PUMA

Volante GC Ti Jr.
Stødd: 28 - 35
499,-



P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR N. Finsensgøta 5 Postmoga 1108 FO-110 Tórshavn

Fuglafjarðar Keypsamtøka
Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895






# ÁRSINS
## ÍF'ARI 2001

# TOMEK DAGSINS MAÐUR ÍMÓTI LÍF



Meðan úrslitið var ivasamt í dystinum ímóti LÍF leygardagin 5. mai, var ivin um hvør gjørdist dagsins maður ikki serliga stórur. Áskoðararnir vóru rímuliga samdir, og teir valdu Tomek til dagsins mann. Fyri hetta fær hann ein sunnudagsdøgurða frá Pól á Muntra. Tilukku!!!

### Atkvøðutal

| | ÍF - LÍF | Íalt |
|---|---|---|
| Tomek Przybilski | 41 | 41 |
| Jan Jørgensen | 11 | 11 |
| Alfred Olsen | 10 | 10 |
| Høgni á Lakjuni | 8 | 8 |
| Roy Róin | 2 | 2 |
| Eyðolvur R. Peter. | 2 | 2 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF'ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av andskappingardystunum í ár.

Restaurant Muntra

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

HARALDSEN
- títt keyp -

## Atkvøðuseðil

Dystur: ____________

Nr. 1 (5 stig): ____________ Leikari

Nr. 2 (3 stig): ____________ Leikari

Nr. 3 (2 stig): ____________ Leikari

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ____________ Tel.: ____________

# HAGTØL & FAKTA

## STØÐAN 2. DEILD MENN - 29. apríl

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. SKÁLA | 3 | 2 | 1 | 0 | 9-3 | 7 | 0-0-1 | 1-1-0 |
| 2. LÍF | 3 | 2 | 1 | 0 | 6-2 | 7 | 2-0-0 | 0-1-0 |
| 3. B36 | 3 | 2 | 1 | 0 | 5-3 | 7 | 0-1-0 | 2-0-0 |
| 4. KÍ | 3 | 1 | 2 | 0 | 5-1 | 5 | 1-0-0 | 1-1-0 |
| 5. ÍF | 3 | 1 | 1 | 1 | 8-5 | 4 | 0-1-0 | 1-1-0 |
| 6. HB | 3 | 1 | 1 | 1 | 6-6 | 4 | 1-1-0 | 0-0-1 |
| 7. Sumba | 3 | 1 | 0 | 2 | 8-7 | 3 | 1-0-0 | 0-0-2 |
| 8. NSÍ | 3 | 1 | 0 | 2 | 5-8 | 3 | 1-0-1 | 0-0-1 |
| 9. TB | 3 | 0 | 1 | 2 | 1-5 | 1 | 0-1-1 | 0-0-1 |
| 10. GÍ | 3 | 0 | 0 | 3 | 1-4 | 0 | 0-0-1 | 0-0-2 |

## Kort - landskapping

| Leikari | G | R |
|---|---|---|
| Heini Heinason | 2 | |
| John S. Thomsen | 1 | |
| Høgni á Lakjuni | 1 | |

## Aðrir dystir í dag 2. deild

Skála - B36

NSÍ - Sumba

HB - LÍF

GÍ - TB

## Málskjúttar

| | |
|---|---|
| *Jan Jørgensen, ÍF* | 3 |
| Tomek Resel, LÍF | 3 |
| Gunnar Mohr, HB | 3 |
| Nebosja Veljkovic, Sumba | 3 |
| Ragnar Poulsen, B36 | 2 |
| *Høgni á Lakjuni, ÍF* | 2 |
| Leon Bjartalíð, KÍ | 2 |
| Jonhard Høgnesen, LÍF | 2 |
| Aki L. Hansen, NSÍ | 2 |
| Bogi Gregersen, Skála | 2 |
| Alexandur Johansen, Sk. | 2 |

## Málskjúttar ÍF Lands- og steypakappingin

| Leikari | L | S |
|---|---|---|
| Høgni á Lakjuni | 2 | 4 |
| Heini Heinason | | 5 |
| Eyðolvur R. Pet. | 1 | 3 |
| Jan Jørgensen | 3 | |
| Viggo Johannesen | | 2 |
| Bárður á Lakjuni | | 2 |
| Tomek Przybilski | 1 | |
| Sjálvmál | 1 | 1 |

## Dystir í 1. deild 20.05 - 4. umfar

GÍ - B36

KÍ - NSÍ

HB - VB

B68 - B71

FS Vágar - EB/Streymur

## Dysti 3. deild 20.05 - 4. umfar

GÍ - B36

KÍ - Royn

AB - VB

B68 - B71

*ÍF - TB*

## Vert at vita

Næsti dystur hjá 1. liðið hjá ÍF verður leygardagin 26.05 á Sevmýru ímóti TB.
Næsti heimadystur verður leygardagin 04.06 ímóti B36.

3. deild spælir heima ímóti TB í morgin. Næsta sunnudag leika teir ímóti B36 í Gundadali.
Um tú atkvøður í dag um, hvør er dagsins leikari, so er tú við í lutakastinum um at vinna eitt lambskrov frá Haraldsen. Atkvøðuseðlar eru á síðu 29, ella tú kanst fáa teir í ovaru hæddini Ítróttarhúsinum undir og beint eftir dystin.





# UNN NÝGGJUR SAMSKIPARI

Unn E. Petersen er sett sum nýggjur samskipari hjá ÍF. Jón N. Olsen, formaður, sigur, at nevndin metir, at tað gerst meir og meir neyðugt at fáa ein samskipara, at taka sær av pørtum av tí praktiska. Tankin við einum løntum samskipara er ikki heilt nýggjur. Onkur av undanfarnu nevndum hevur hugsa um møguleikan, men ikki gjørt nakað.

"Men seinastu árini er tað bara vorðið torførari og torførari at fáa fólk í nevnd. Fleiri at teimum sum játtað seg, gera tað, tí eingin annar vil í nevnd", sigur Jón. "Tað er gleðiligt, at hesi siga ja, men ofta hava tey ríkiligt av arbeiði at gera frammanundan, og tí strekkir tíðin ikki til nevndararbeiði, sum eftirhondini krev-ur meri og meir. Tí meta vit í nevndini, at tíðin búgvin at royna hetta, og við hesi starvsetan meta vit somuleiðis, at felagið kemur at virka betur", leggur Jón afturat.

Høvuðsuppgávan hjá Unn verður at samskipa ÍF sum *eitt* felag. "Hon skal hjálpa til við tiltøkum, sum kanska ikki høvdu verið gjørd annars. Annars ganga øll praktisk ting ígjøgnum Unn, s.s. tilrættalegging av dystum o.a." sigur Jón.
Skrivstovan hjá Unn verður í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum, og nú ber til at fáa fatur á ÍF alt døgnið á tel. 444 636 ella 22 42 53.

### Unn gleðir seg

Felagsarbeiðið er ikki fremmant fyri nýggja samskiparan. Unn hevur nevnliga sitið í aðalnevndin frá 1997-2000, og er í dag 1. tiltakslimur. "Eg kenni til arbeiðið, og veit eisini, hvussu nógv pappírarbeiði er". "Og umsiting minkar ikki, tvørturímóti", sigur Unn. Unn

> "Ítrótturin er ikki bert "hygg" longur"

dylir ikki fyri, at hon hevur sett sær nøkur mál, sum hon vil røkka. Og, sum hon sjálv sigur, "avbjóðingar eru har, tí eg komi at verða ein partur av øllum". Men hetta, eins og við ítróttinum, krevur hart arbeiðið, ásannar Unn.

Stóra tiltakið, sum liggur fremst í huganum beint nú, er Varmakeldustevnan, sum verður vikuskiftið 29. juni-1. Juli.

Lítil iva man vera um, at stigið við einum løntum samskipara ger, at tað í framtíðini verður lættari at koma í nevnd. Ein uppgávu hjá Unn verður at leggja tingini í fastar rammur.
Vit ynskja Unn góðan byrð í nýggja og spennandi starvi-

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 64
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fartel. 22 42 53
Fax 445 053

***Aðalnevndin:***
Formaður:
Jón N. Olsen, tel. 444 650
Varaformaður:
Njal R. Petersen, tel. 444 994
Skrivari:
Hjalti Lundsbjerg, tel. 444 079
Peningarøkil:
Andrea Lervig, tel. 444 267

***Fótbóltsdeild:***
Formaður:
Sonni Jensen, tel. 444 975
Ragnhard Petersen, tel. 444 353
Hildigarð Eliasen, tel. 444 052

***Samskipanarleiðari:***
Unn E. Petersen, tel. 444 053

***Venjarar:***
***2. Deild:***
Pauli Jarnskor, tel. 441 353
***3. Deild:***
Ólavur Ellingsgaard, tel. 21 26 86
***4. Deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***5. Deild:***
Old Boys:
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Áku Petersen, tel. 444 419
***Dreingir Ø.:***
Andrew Hansen, tel. 444114
***Smádreingir Ø.:***
Áku Petersen, tel. 444 419
***Piltar M.:***
Ragnhard Petersen, tel. 444 353
***Smágentur:***
John/Birgar, tel. 444 402/25 03 25
***G.10-12 ár:***
John Thomsen, tel. 444 402
***Smápiltar:***
Bogi/Hanus, tel. 444 347/444 052
***Pinkur:***
Hanna Lassaberg, tel. 444 401

# ÍF

# KÍ

| ÍF | KÍ |
|---|---|
| 1. Alfred Olsen | ____ Karstin Joensen |
| 2. Janus Petersen | ____ Atli Jacobsen |
| 3. Hjalti Lundsbjerg | ____ Pól Juul Vilhelmsen |
| 4. Viggo Johannesen | ____ Kristian Andreassen |
| 5. Tomek Przybilski | ____ Leon Bjartalið |
| 6. Roy Róin | ____ Olgar Danielsen |
| 7. Eyðun Ryggshamar | ____ Torleif Eyðun Petersen |
| 8. Mortan Thomsen | ____ Rógvi Laksafoss |
| 9. Heini Heinason | ____ Gunnleif Biskupstøð |
| 10. Bárður á Lakjuni | ____ Meinhardt Hansen |
| 11. Eyðolvur R. Petersen | ____ Rúni Eltør |
| 13. Tórstein Joensen, liðs. | ____ Ólavur Kjølbro |
| 14. John S. Thomsen | ____ John Havn |
| 15. Høgni Zachariassen | ____ Erling Fles |
| 17. Jan Jørgensen | ____ Andrias Josephsen |
| 18. Áki Petersen | ____ |
| 19. Høgni á Lakjuni | |
| 20. Hanus Eliasen | |

Venjari: Pauli Jarnskor — Venjari: Andrias Josephsen

Liðleiðari: Jóhan Símun Joensen — Liðleiðari:

## Dómarabólkur:

Dómari: Erling Eysturoy
Linjuverjar úr HB

## Bóltsponsorur:

P/F Petur Larsen